Vikuskiftis Sosialurin

Nr. 54 - 16. mars 2007

# Økja gjónna ímillum bólkarnar í samfelagnum



*Eftirlønin er eitt stórmál hjá fakfeløgunum. Men Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at tað, sum órógvar eina mest í pensjónsuppskotinum frá Fíggjarmálaráðnum, er fyrst og fremst, at ov nógvir smálutir í uppskotinum ikki eru útgreinaðir*

**Krevja politikararnir, at feløgini skulu hava 15% í eftirløn, er tað at skerja samráðingarrættin hjá fakfeløgunum munandi og tað kann verða við til at gera gjónna ímillum bólkarnar í samfelagnum enn størri, sigur Føroya Arbeiðarafelag**

ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað eru nógv viðurskifti, sum fakfeløgini ikki eru fegin um.

Tað staðfestir Ingeborg Vinther í ársfrágreiðing síni á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag í morgun.

Og tað, sum hon sipar til, er uppskotið, sum Fíggjarmálaráðið hevur almannakunngjørt um at gera eina eftirlønarskipan fyri allar borgarar landsins.

– Eftir ppskotinum úr Fíggjarmálastýrinum, fer lønarmunurin at gerast størri millum samfelagsbólkarnar, enn hann er í dag, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at tey, sum sum hava eftirlønir, ið eru komnar upp á 15%, nýtast ikki at seta meira av til eftirløn, tá ið tey eru til lønarsamráðingar.

– Men arbeiðarafeløgini, ið hava eina eftirløn upp á 6,1%, mugu hvørja ferð, tey eru til samráðingar, hugsa um, at ein partur av lønarhækkingini skal til eftirløn.

– Hetta hevur við sær, at lønarójavnin verður nógv størri, enn hann er í dag, sigur hon.

## Nógv ógreitt

Annars heldur ingeborg Vinther, at grundupphæddin og Samhaldsfasti eiga at vera tað sama, hvør so enn hjúnastøða hjá fólki er.

Og inntøka hjá fólki eigur ikki at verða mótroknað hjá hjúnafelaganum.

– Sum skipanin er í løtuni, er tað stundum ein stórur trupulleiki hjá pensjónistum, at vera í hjúnabandi, tí inntøkan hjá hjúnafelaganum verður mótroknað í viðbótini.

– Tað skal ikki vera ein vansi hjá fólki at vera gift, staðfestir Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.

Ingeborg Vinther sigur, at tað, sum órógvar eina mest í pensjónsuppskotinum frá Fíggjarmálaráðnum, er fyrst og fremst, at ov nógvir smálutir í uppskotinum ikki eru útgreinaðir. Samhaldsfasti verður settur saman við grundviðbótini, og gjaldið skal hækkast. Men hvussu verður hetta gjørt tekniskt? Skulu løntakarar rinda meir, ella verður hetta javnað út við skattinum?

Og hvør skal umsita Samhaldsfasta?

Ingeborg Vinther staðfestir, at hesin spurningurin er heilt grundleggjandi fyri Fakfeløgini. Tí er spurningurin um tað framhaldandi skal vera sum tað er í dag, at tað er ein nevnd, sum situr óheft av politiska myndugleikanum, ella hvussu verður hetta frameftir?

Feløgini mæla til, at Samhaldsfasti, saman við øðrum arbeiðsmarknaðargrunnum, verður lagdur út til arbeiðsmarknaðin at umsita.

– Annars eru feløgini fyri at styrkja um Samhaldsfasta, sum mælt verður til í uppskotinum frá Fíggjarmálaráðnum.

Men spurningurin er um hetta verður útreiðsluneutralt, so at vit ikki skulu betala meir, enn vit gera nú?



## Mótrokningin skal lækka

Ingeborg Vinther sigur, at tað er eisini ógreitt, um tað einans er lønarinntøka, ið skal mótroknast, ella tað er frá arbeiðsmarknaðar- og persónligu pensjónini.

– Feløgini eru ímóti, at mótroknað verður frá fyrstu krónu í viðbótini, ið pensjónistar fáa aftur at grundupphæddini/samhaldsfasta. Hetta tekur hugin frá fólki at leggja til síðis til ellisárini ella til at arbeiða við síðuna av pensjónini.

Hinvegin ásanna feløgini eisini, at fólk skulu kunna arbeiða, uttan at verða revsað fyri hetta og tí átti mótrokningarprosentið, sum í løtuni er 60% fyri inntøku oman fyri 54.000 krónur, at verðið lækkað niður í 30%.

Fakfeløgini halda eisini, at tað er umráðandi er, at limirnir í fakfeløgunum sleppa at gera av, hvat slag av pensjón og trygging felagið hevur.

– Tí er tað óheppið, at landið ásetur, at øll pensjónin skal vera ein lívrenta. Feløgini vilja sleppa at hava rásarúm yvir sínum pensjónsviðurskiftum, sigur Ingeborg Vinther.

Og hon spyr, hvat hendir við pensjónunum, sum feløgini longu hava spart upp?

Sjálv staðfestir hon, at feløgini eru ímóti, at tað almenna ger inntriv í pensjónir, sum feløgini longu hava.

Tað er eisini ógreitt, hvussu pensjónirnar verða skattaðar.

Skulu tær skattast øðrvísi enn í dag, spyr hon.

Men hon heldur eisini, at tað er neyðugt at fáa pensjón av bruttuløn. Tað merkir, at pensjón skal eisini rindast av yvirtíð og øðrum gjøldum í lønini.

– Eisini skal pensjónsgjald leggjast oman á veitingar frá tí almenna úr grunnum, eitt nú barnsburðargrunninum og arbeiðsloysisstuðlinum.

Og at enda heldur hon, at tað er neyðugt við eftirløn til fólk, sum eru slitin á arbeiðsmarknaðinum. - Tað eru summi viðurskifti sum gera, at fólk ikki kunna arbeiða til tey eru 67 ára gomul. Tí skal tað bera til at fáa eftirløn vegna slit – og ikki sum nú, at hesi fólkini verða gjørd til fyritíðarpensjónistar, sigur Ingeborg Vinther.

Annars hav Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag so mikið gott samstarv, at tey hava lagt lívstryggingarnar saman. Nú verður eisini umhugsað at leggja eftirlønirnar hjá báðum feløgunum saman, men tað skal drúgt fyrireikingararbeiði til og tað er ikki gjørt enn.

# Jacob Vestergaard klagaður

**Hann er klagaður fyri Løgtingsins umboðsmanni fyri avgerðina um at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar**

STRANDFERÐSLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er Sigmund Poulsen, sakførari, sum klagar vegna Starvsmannafelagið. Og Starvsmannafelagið umboðar Jóhan Isholm, sum arbeiðir á Strandfaraskipum Landsins og býr í Tórshavn

Men viðmerkt verður, at nógvir limir í Starvsmannafelagnum arbeiða á Strandferðsluni og tí er tað meira av formligum orsøkum, at júst nevndi limur sum kærir.

Og tað, sum Jacob Vestergaard verður kærdur um, er at Johan Isholm ikki er hoyrdur um avgerðina at flyta umsitingina hjá Strandfaraskipum Landsins úr Tórshavn, har kærarin býr hevur hevur sítt húsarhald

Samstundis veðrur kært um, at hann heldur ikki síðani hevur fingið møguleikar fyri hoyring og at enda verður kært um, at hann als ongar upplýsingar yvirhøvur hevur fingið um málið enn.

Víst verður á, at 26. februar stóð at lesa á Portalinum, at ”samgongan” hevði tikið avgerð um at øll umsitingin av Strandfaraskipum Landsins skal flytast til Suðuroyar tann 1. januar Starvsfólkið á Standferðsluni visti einki um hetta og hevði eingi boð fingið.

Dagin eftir boðaði landsstýrismaðurin í innlendismálum starvsfólkunum á Strandfaraskipum Landsins til fundar til fundar og har upplýsti hann, at avgerðin er tikin, at hann hevði tikið avgerðina, at hetta var ein politisk avgerð, at hetta er fyri at skapa arbeiðspláss í Suðuroy, men at tað seinni kann koma upp á tal, at onkur kann arbeiða part av tíðini í Tórshavn . Og hann upplýsti, at hetta verður gjørt, ”kosta hvat tað kosta vil”, sum hann tók til.

Síðani tá er einki meira hent. Ikki eitt orð frá landsstýrismanninum ella Innlendismálaráðnum.

Sakførarin hjá Strandferðsluni sigur, at talan er um eina fyrisitingarliga avgerð og at proklameringin um, at talan er um eina ”politiska avgerð”, ikki útihýsir, at talan er um eina fyrisitingarliga avgerð.

Hann sigur eisini, at avgerðin ger inntriv í starvsviðurskiftini hjá nevnda kæraranum og at hann tí hevur krav upp á at verða hoyrdur

Somuleiðis sigur hann, at avgerðin er eitt so ógvusligt inntriv í starvsviðurskiftini hjá honum, at talan í veruleikanum er um eina uppsøgn, og at reglurnar um víðkaða hoyringsskyldu tí eiga at galda fyri málið.

At enda sigur hann, at av tí at talan er um eina serstøðu, sum í veruleikanum fær álvarsligar avleiðingar fyri meira enn 20 fólk, og av tí at niðurstøða tygara møguliga kann hugsast at fáa ávirkan á rættarstøðu teirra, heitir hann Løgtingsins Umboðsmann um viðgera málið skjótt og at taka eina skjóta avgerð.



*Starvsmannafelagið vil nú hava Løgtingsins Umboðsmann at viga og máta avgerðina hjá Jacob Vestergaard um at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar*